# Víkingur imponeraði Schuster

**EUROPA LEAGUE** Venjarin hjá Besiktas hevði sjáldan sæð so góða taktiska disiplin, sum hann sá hjá Víkingi í dystinum í gjárkvøldið, men teir í Víkingi iðraðu seg um, at Besiktas skuldi fáa triðja málið til síðst

Hilmar Jan Hansen

– Eg eri sera glaður fyri innsatsin, sum spælararnir gjørdu á vøllinum, tí allir góvu seg meira enn 100 prosent, og gjøgnum allan dystin megnaðu vit at halda allar tær avtalur, vit høvdu gjørt frammanundan. Sjálvandi ert tú ongantíð nøgdur við at tapa, men her var altso talan um so sterka mótstøðu, at tað kundu vit ikki gera so nógv við.

Jógvan Martin Olsen var týðiliga errin av spælarunum hjá Víkingi, eftir at teir í steikjandi hita niðri í Turkalandi »bara« høvdu tapt 3-0 fyri Besiktas. Í nógva hitanum royndu spælararnir at ansa eftir, at teir fingu neyðugu vætuna, men kortini vóru teir allir lætnaðir nógv eftir dystin – og tann, ið mist mest, var lætnaður hálvtfimta kilo!






Myndir: kralspor.ensonhaber.com



## Rós frá Schuster

– Undan dystinum vóru vit eisini ávaraðir um, at vit kundu vænta okkum serliga heita móttøku frá fjepparunum hjá Besiktas, men tað gjørdist heilt øðrvísi, enn vit høvdu væntað. Teir høvdu nokk skilt í fjølmiðlunum, at hetta vóru alt amatørar, sum vitjaðu, so teir tóku sera væl ímóti okkum, og tá dysturin var liðugur, sungu teir »Víkingur! Víkingur!« fyri spælarunum hjá okkum, sigur Jógvan Martin, ið eisini fekk rós frá týska Besiktas-venjaranum:

– Ja, Bernd Schuster segði eftir dystin, at hann var imponeraður av spælarunum hjá Víkingini, og at hann sjáldan hevði sæð so góða taktiska disiplin. Sjálvur kundi eg heldur ikki seta fingurin á nakað, men vit iðraðu okkum eitt sindur um, at teir skuldu fáa hatta triðja málið aftrat ímóti endanum.

## Geza stóð væl

Turkiski landsliðsframherjin, Nihat Kahveci, sum hevur spælt í sjey ár á hægsta stigi í sponskum fótbólti við fyrst Real Sociedad og síðani Villareal, skoraði umleið 20 minuttir inni í hvønn hálvleiki, og í seinasta minutti økti Mert Nobre við skallara til 3-0. Umframt hetta søgdu hagtølini 16-1 til Besiktas í skotroyndum og 18-1 í hornaspørkum.

– Størsta møguleikan hjá okkum hevði Páll Klettskarð, tá hann í fyrra hálvleiki royndi seg við góðum skoti úr 20 metrum, men málmaðurin hjá teimum fekk akkurát fingrarnar á bóltin. Annars høvdu vit í fyrra hálvleiki gott uppspæl nakrar ferðir, umframt at Geza Turi hevði einar tvær fantastiskar bjargingar í fyrra hálvleiki og eina í seinna, sigur Jógvan Martin Olsen.

*hilmarjan@sosialurin.fo*



**UEFA Europa League** · Besiktas Inönü, Istanbul, hósdagin 15. juli 2010 kl. 21.00

### Besiktas - Víkingur 3-0 (1-0)

**1-0: Nihat Kahveci, 19.**
**2-0: Nihat Kahveci, 65.**
**3-0: Mert Nobre, 90.**
Dómari: Igor Egorov, Russland

**Besiktas:** Hakan Arikan – Erhan Güven (Ekrem Dag, 73.), Ibrahim Toraman, Ibrahim Üzülmez, Tomas Sivok – Fabias Ernst, Rodrigo Tabata – Nihat Kahveci (Mert Nobre, 83.), Matias Delgado (Necip Uysal, 83.), Ricardo Quaresma – Bobo
***Gult kort:*** Ibrahim Toraman
**Víkingur:** Geza Turi – Bárður Hansen, Niclas Niclasen, Erling Jacobsen, Hanus Jacobsen – Sølvi Vatnhamar (Áslakur R. Petersen, 89.), Nenad Stankovic, Sam Jacobsen, Hans Jørgen Djurhuus (Kaj Leo í Bartalsstovu, 46.) – Finnur Justinussen, Páll Klettskarð (Andreas Lava Olsen, 76.)
***Gult kort:*** Hans Jørgen Djurhuus, Sølvi Vatnhamar

## Hagtøl úr Newcastle:

### Newcastle U19 - Føroyar U19 1-2

**1-1: Gunnar Zachariassen**
**1-2: Sørmund Kalsø**

**Byrjunarliðið (4-2-3-1):** Teitur Gestsson – Rene Joensen, Eli F. Nielsen, Sørmund Kalsø, Rógvi Nielsen – Ari Ellingsgaard, Ivan Joensen – Bogi R. Petersen, Gunnar Zachariassen, Janus M. Thorup – Holgar Durhuus
***Á bonkinum:*** Pál Joensen, Justinus Johan Jacobsen, Kristian Joensen, Árni Frederiksberg, Andras Vágshegg, Páll H. Jacobsen

### Whitley Bay FC - Føroyar U17 3-0

**Byrjunarliðið (4-2-3-1):** Jákup Højgaard – Jóhan á Plógv, Hørður Askham, Allan Hansen, Rói av Fløtum – Brandur Suðuroy, Magnus Egilson, Ragnar Tausen, Marcus Clementsen, Ári Danielsen – Rasmus Dan Sørensen
***Á bonkinum:*** Petur Høj, Jákup Sveinbjørn Olsen, Arnold Kristiansen, Andrias H. Eriksen, Eirikur M. Ellendersen, Teitur Olsen, Eli Leifson Nolsøe, Bárður Guttesen, Kári Hvannastein

### Wallsend Boys Club - Føroyar U15 2-0

**Byrjunarliðið (4-2-3-1):** Axel Berg – Betuel Hansen, Bartal Wardum, Jákup F. Hansen, Hilmar L. Jacobsen – Hákun Edmundsson, Áron Clementsen – Sigurd Poulsen, Brandur Olsen, Patrik Jóhannesen – Jóhannus Hansen
***Á bonkinum:*** Súni Højgaard, Rói Olsen, Esmar Clementsen, Tór av Skarði, Elias Rasmussen, Jákup Olsen, Meinhard Olsen, Leivur Højgaard, Poul Ingason